## DAGSINS MEINING

# Nýgg skip – nýggjur hugburður

Í fjórðingsøld hava vit á hesum stað júkað upp í saman, hvussu stóran týdning tað hevur, at vit fáa meira burtur úr tilfeingi okkara, so at vit kunnu økja um virðið á okkara høvuðsútflutningsvøru.

Nógvar royndir eru gjørdar. Sumt er eydnast, meðan annað ikki er eydnast í fyrstu atløgu.

Tað var tí hugaligt at hoyra reiðaran í J.F. K. Trol, Hanus Hansen, siga, at ætlanin er ikki, at nýggja skipið skal fiska so nógv meira, hóast bæði maskinorka, spøl og troldekk kunnu fáa nógv fleiri tons í pavnarnar og til verksmiðjuborðini.

Tvørturímóti hevur reiðaríið sett sær fyri at fáa meira til sættis og gera meira burtur úr fiskinum, so sum mest fæst burtur úr hvørjum tonsi.

Skálaberg er eitt prýðiligt skip. Hugsað er bæði um góð arbeiðskor og um góðar umstøður hjá manningini at búleikast í og annars hugna sær í. Hesum hevur onkur hug at glepsa at. – Men hví skal fiskimaðurin uppi í ísinum ikki hava eins góðar umstøður og heimafólkið? Skipið er jú hansara arbeiðspláss og »annað heim« flestu dagar í árinum!

Nýggi Skálaberg er dýrur – út við 170 milliónir kr., og skal leggja 65 milliónir kr. eftir seg árliga. Tað er at vóna, at tað fer at eydnast, og at meira fæst burtur úr hvørjum tonsi.

Reiðaríið hevur sýnt eina hugburðsbroyting, sum má og skal til, um vit skulu økja samfelagsinntøkurnar og byggja upp ein sjálvberandi búskap.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ólavsøkukonsertin gerst ein vanlukka

**Trygvi Jacobsen**

Ólavsøkukonsert hevur verið í kommunuskúlagarðinum nakrar ferðir, og skilið hevur verið líka ringt hvørja ferð. Óteljandi fløskubrot liggja og rekast og hótta við at forkoma føroyska ungdóminum.

Sjálvandi er tað ungdómurin sjálvur, sum dregur fløskurnar í garðin, men tað er nú einaferð soleiðis, at ungdómurin er tystur, og lítið man tað muna, at tey tilkomnu halda lítið um tað.

Flestu fløskur, sum tey ungu dragsa við sær, eru úr glasi stoyptar. Tað er ikki so undarligt. Teimum ungu dámar væl øl. Øl fæst ikki í Kommunuskúlagarðinum. Øl úr glasfløskum smakkar nógv betur enn øl úr plastfløskum. Føroyskt plastøl fæst bert í risastórum fløskum, ið ikki hóska til øl, tí ølið dovnar í teimum, áðrenn tær tømast.

Tað hevur øll hesi árini verið sera keðiligt við øllum hesum knústu fløskunum. Tá menn so í fjør søgdu, at eingin glasfløska skuldi inn á konsertøkið, var tað eitt gleðiligt framstig. Tystir hampamenn riggaðu seg til eina glasleysa konsert. Summir blandaðu sær okkurt niður í plastfløskur, og aðrir keyptu sær øl í plastfløskum. Nakrar tímar áðrenn konsertina frættist, at glasfløskur kundu takast við á konsert kortini. Tað er ikki stuttligt at hava gjørt sær ómak við at koma glasleysur á konsert fyri at skera seg til avlívs.

Slíkt kanst tú ikki bjóða fólki. Eg haldi ógvuliga lítið um at vera hildin fyri spott.

Nógv kann gerast fyri at sleppa undan glasfløskum. Tað besta er sjálvandi at nokta fólki at koma inn við teimum. Tað ber til at at hava fleiri vaktir enn undanfarin ár, um arbeiðsbyrðan er ov tung. Eisini ber til at hava eina inngongd til fólk, sum koma við tasku, sekki ella leypi. Tey kunnu so kannast fyri seg. Tey, sum koma við ongum, kunnu sleppa inn ein annan veg. Tað ber eisini til at selja øl á konsertøkinum.

Í øðrum londum verða fólk tveitt í geglið fyri grovt ábyrgdarloysi, tá vanlukkur henda. Var eg einaræðisharri, vórðu menn, sum sýndu slíkt ábyrgdarloysi, settir at rippa húkar. Eftir mínari meining er slíkt revsivert, sjálvt um lítið av skaða stendst av tí. Betri er at vera fyrivarin enn eftirsnarin.

Vónandi verður skilið frægari í ár, men eg stúri fyri, at fyriskipararnir eru so mikið óðir eftir verðini, at heilsan hjá føroyska ungdóminum verður sett í veð.

Vit bíða eftir vanlukkuni.

# Stór skomm

**Georg Kjærbo**
*3961 Uummannaq*
*Grønland*

Eg havi arbeitt í útlondum í eini 30 ár, so eg havi flogið nógvar ferðir til Føroyar.

Men tá eg var heima seinast – hetta var á fiskarímessuni í Runavík – upplivdi eg nakað, sum eg haldi er ein skandala og stór skomm! Eg varð boðin at eta um borð á Norrønu; men vit kundu ikki keypa so mikið sum eitt glas av víni til matin. Og eg frætti, at Jenis av Rana var atvoldin til tess!

Nú lesi eg í Dimmu, at føroyingar vilja hava loyvi til at bryggja ein "føroya snaps", men at sami maður, Jenis av Rana, aftur liggur í buktini!

Fyri umleið 20-25 árum síðani fleyg eg frá Danmark til Føroya. Vit kundu ikki lenda, men máttu flúgva til Skotlands at gista. Tá búði eg á sama kamari sum Jenis av Rana, og vit báðir ótu nátturða saman og drukku øl afturvið matinum. Næsta dag flugu vit so aftur til Føroyar, og tá sótu vit báðir lið um lið um borð á flogfarinum, og tá keypti Jenis eisini tollfríar vørur eins og tey flestu.

Hvat skal hesin dupultmoralurin til?

Og hvussu í verðini skal hesin dupultmoralurin kunna gagna føroyskum vinnulívi?

# Hugleiðing

**Hildibjørt J. K. Gulklett.**

Eg havi altíð havt áhuga fyri forngripum og umhvørvi teirra, bæði her á landi, og úti í heimi.

Tá ið fornlutirnir vóru á gamla bókasavninum á Debessartrøð og í bátaneystinum skamt harfrá, var tað ein fragd at ganga millum hesar lutir, hóast trongligt var. Alt var so væl til rættis lagt. Lepi var festur á hvønn lut og hvørt plagg, har skrivað stóð, hvaðani lutirnir vóru, og hvør hevði latið teir inn.

Alt hetta saknar mann, nú savnið flutti í nýmótans hølir, stórbær og hábærslig!

Nú stendur ikki so nógv frammi sum í tronganum, ið har úti var. Kemur mann so til bátaneystið, er einki uppmerkt av nøkrum, sum til dømis, hvar bátarnir eru frá.

Alt samalt er vakurt uppsett - innan fyri glar og rammu, alt gott um tað; men tað sum var harúti, manglar her. Fólk ganga bara og fáa ongan hollan kunnleika um lutirnar.

Tá mann so fer oman til gamla Hoyvíksgarð og útisavnið, sum bæði hoyra saman, og síðani kemur innar í roykstovuna, er tað fyrsta, sum mann leggur til merkis, komfýrurin!

Hevði tað til dømis ikki borið til at fingið ringar til annað eldholið á komfýrinum á garðinum? Hatta dekslið skemmir! Hatta er tað fyrsta, fremmandafólkini leggja til merkis, tá tey koma inn í roykstovuna, tí gløgt er gestsins eyga!

Eg var í Blásastovu í Norðragøtu fyri fýra árum síðani. Har er eisini eitt savn, og har gekk ein eldhugað sál og umrøddi hvønn einstakan lut, stóran sum lítlan, út í æsir, so mann var nógv ríkari av vitan, tá mann fór haðani frá. Tíverri er hesin ikki meira okkara millum, so tað má kennast meira tómt, tá so søgurík fólk fara.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Barnaprix og Vestanstevna

**Mark Joensen**

Tað er lættari at bróta niður enn at byggja nakað upp.

Nósabarnaprix er eitt tiltak fyri børnum í aldrinum 7-14 ár. Á einum Nósabarnaprix fáa børnini høvi at royna at standa á einum yrkisgjørdum palli, og harvið kunnu tey sleppa at royna seg sum yrkissangarar.

Tey nógvu børnini, sum higartil hava luttikið, hava øll gjørt sera nógv burturúr bæði við sangi, kóri og dansi. Luttakararnir hava, hvør sum ein, uppiborið alt tað rós, tey kunnu fáa fyri teirra ágrýtni og áhuga fyri hesum tiltakinum.

Vit, sum fyrireikarar halda, og hava eisini fingið sjón fyri søgn, at hetta er eitt gott og neyðugt tiltak, sum er eitt munagott ískoyti fyri betri trivnaði, bæði á tí tónleikaliga- og sersakliga eisini á tí sosiala økinum.

Mong vóru tey, sum hava verið og hugt, sum frøddist yvir, hvussu gott børnini sungu og dansaðu, og eingin ivi man vera í, at vit eiga nógv evnarík børn, sum koma at gera seg galdandi á yrkisvendum tónleikapallum framyvir. Vit, sum hava møguleika fyri tí, skulu bert skapa teimum teir neyðugu karmarnar. Tað er tað, sum okkara endamál við "Nósabarnaprix" er.

At fyrireika eitt so stórt tiltak er ikki ein løtt uppgáva og krevur ymsar tillagingar. Eg vil undir-strikað, at hetta er nakað, tú fert undir, bert um áhugi er fyri tí. Vit mugu ikki gloyma at "Nósabarnaprix" fyri fyrstu ferð sá dagsins ljós í fjør, og tað tekur uttan iva eini 3 til 5 ár, áðrenn tiltakið er tillagað til fullnar. Tað ber við sær, at tað fara nakrar boytingar fram ,sum eru neyðugar, men ikki altíð líka hepnar. Tað er sum áður nevnt ein viðgerð sum má finna stað. Sum Teitur Lassen sigur: "Áðrenn tína frelsu, mást tú hava syndað"

Sjálvandi skulu vit, sum fyrireika "Nósabarnaprix" taka hædd fyri, at tillagingar fara fram, uttan alt ov nógvar radikalar broytingar. Tí er tað heilt einfalt neyðugt, at samstarvsáhugi er. Tað er eitt tað fyrsta vit leggja okkum eftir, tá ið vit fara undir fyrireikingarnar til tiltakið.

Vit fóru undir at fyrireika "Nósabarnaprix 2003" í nov. 02. Tá hildu vit, at tað varð eitt sera gott hugskot at leggja undanumførini á stevnunum, við tí í huganum, at so høvdu børn og onnur áhugað okkurt annað gott tilboð at fara til. Samstundis vóru vit til reiðar at gera eina samstarvsavtalu, sum báðir partar kundu fingið fíggjarligan ágóða av.

Sæð í bakspeglinum mugu vit ásannað, at samstarvið, sum vit høvdu ynskt, ikki kundi til fulnar fremjast í verki.

At leggja "Nósabarnaprix" á Vestanstevnu er ikki eitt gott hugskot, fingu vit at vita við greiðum orðum aftaná undanumfarið har vesturi. So tað taka vit til eftirtektar sum ein part av áðurnevdu tillaging av tiltakinum.

Vit vilja við hesum bera eina umbering til Vágafólk og onnur viðkomandi, sum halda, vit hava borið okkum skeivt at. Samstundis vilja vit heitað á foreldur um at hava yvirskot og tol til at lata tiltakið menna seg, so at vit øll í nærmastu framtíð kunnu frøast yvir, at vit í Føroyum eisini hava eitt "Barnaprix".

# Viðvíkjandi sak um nýggja fergulegu á Trongisvágsfirði

**Føroya Náttúruverndarfelag – FNU**
*Erling Simonsen, formaður*

Vísandi til at friðingarnevndin fyri Suðuroyar sýslu hin 28. nov. 2002 viðmælti verkætlanina hjá Landsverkfrøðinginum til nýggja fergulegu á Trongisvágsfirði, og at yvirfriðingarnevndin seinri staðfesti niðurstøðuna hjá friðingarnevndini, skal Føroya Náttúruverndarfelag eftir nevndarviðger í dag heita á yvirfriðingarnevndina, at taka málið um plasering av leguni og grótkastinum upp til nýggja viðger, tá nýggjar upplýsingar eru komnar fram um sjáldsaman taravøkstur, ið einans finnist kring hólmarnar á Trongisvágsfirði.

Kanning hjá Biofar frá 1999 um smádjóra- og plantusløg á grunnum vatni á føroyskum firðum, sigur frá, at serstaka tarðaslagið Fugus serratus, ið ikki áður er funnið á landinum, má verða komið til Lítla Hólm seinru 10 til 20 árini.

Vísindaligar kanningar eru áður gjørdar í økinum. Í árinum 1800 sigur lívfrøðingurin Landt frá, at hesin tarðin var vanligur fram við føroysku firðunum. Ivi er um hetta er rætt, tí síðan hava 4 aðrir granskarar í 1819, 1870, 1902 og í 1982 leita eftir Fugus serratus, uttan at hava funnið hann. Mett verður tí, at Landt í 1800 á einhvønn hátt hevur mistikið seg.

Aðrar kanningar verða í løtuni gjørdar á Náttúruvísindadeildini í samstarvi við útlendskar granskingarstovnar um føroysku firðirnar og djóralívið, og savnað er longu hópur av upplýsingum á kortyvirlit um støð í landinum, har fuglur reirast og heldur til líkasum ferðing hjá laksi og síli til áarmunnar.

FNU loyvir sær at vísa yvirfriðingarnevndini á, at landsstýrið hevur tikið undir við (november 1998) norðurlendsku ætlanini til vernd av umhvørvi og náttúru. Her veður m.a. lagt áherðslu á, at tryggja margfaldni av plantum og djórum, teirra biotop og tilhaldsstøð, og samstundis tryggja eina burðadygga nýtslu av náttúru- og ílegutilfeinginum.

Serstakt skulu sjáldsom og hótt plantu- og djórasløg tryggjast so lívfrøðiliga margfaldni er so stórt sum gjørligt.

Hjálagt er yvirlýsing frá FNU um málið frá 12. apríl. Nevnd eru har onnur viðkomandi viðurskifti um tað neyðuga at verja Lítla Hólm, so økið her verður frítt av grótkastinum.

Hetta er alneyðugt tá alt plantu- og djóralív í økinum fær fullkomiliga broyttar umstøður tá 4-5 metur djúpa rennan millum hólmin og land typpist.

Føroya Náttúruverndarfelag metur Lítla Hólm, og alt økið við víkina – Punthavn og Birgishavn – at vera náttúruøki burturav, ið hevur allar fortreytir fyri at verða friðað sambært lógini um náttúrufriðing. Umframt at økið ber av í vakurleika, fornir lutir eru í økinum og siðsøguliga tilfeingið er stórt, er hetta tilhaldstað hjá hópin av fugli og útferðapláss hjá fólki.

Vísindaliga áhugamál eru, sum víst, á staðnum og hava verið tað síðan 1800, so álvarsamar orsøkir eru til at yvirfriðingarnevndin tekur málið upp til nýggja viðger.

Vit leggja við avrit av yvirlýsing frá 12. apríl og loyva okkum at siga frá, at málið verður kunnað alment.

Yvirlýsing frá Føroya Náttúruverndarfelag

## Lítli Hólmur má friðast sum náttúruøki

Vinnumálaráðið hevur biðið Landsverkfrøðingin at gera uppskot til hvar nýggja samferðsluhavnin á Trongisvágsfirði kann byggjast til nýggja Smyril. Verandi havnarlag á Drelnesi kann ikki brúkast tí, sum sagt verður frá, er ov nógvur súður fram við syðra partinum á fjørðinum og verður tí neyðugt at leggja grótkast út á fjørðin at verja atløgubryggjuna.

Sambært uppskotinum skal samferðsluhavnin byggjast upp at Lítla Hólmi og grótkastið leggjast yvir innara part av økinum har stóra grynnan stutt úr landið verður partur í uppfyllingini. Við uppskotinum verður í framtíðini ikki siglandi inn um hólmin.

Lítli Hólmur er serstakt náttúruøki inni á Trongisvágsfirði og einasti í landinum av sínum slag. Frá Gálganum eystaru megin er Birgishavn og Punthavn og síðan stóra víkin innan fyri Lítla Hólm við Krambatanga og velduga sevinum og tarðaskóginum kring hólmin. Tarðaskógurin niður á 4 metra dýpi er upp í 6 hektarar í vídd og tí vakstrarstað hjá hópin av smákyknum, fiskayngli, igulgerðum og øðrum skeljadjórum. Nógv æða og onnur fuglasløg halda til í økinum, ið allarhelst eisini er ónervað av dálking frá húsarhaldum, vinnuvirkjum og alingini á fjørðinum.

Alt strandaøkið frá Gálganum og væl vestur um Lítla Hólm er náttúruøki burturav og nógv brúkt sum útferðapláss har siglast kann við smábátum inn um hólmin. Óføra áhugavert er at hava snøri ella tráðu við sær tá reyðfiskur, seiður og flundra altíð kann fáast. Dýpið millum hólmin og Krambatanga er 3 til 6 metur og er í støðum ljósur sandbotnur og áhugavert at kaga á botn og síggja alt tað lív, ið har fer fram.

Á Krambatanga eru fornar leivdir har miðvíst mark ikki kann setast fyri víddini á økinum. Fornminnissavnið hevur staðfest økið sum friðað øki, og kann tað tí tykjast í meira lagi, at Tvøroyrar kommuna í nýggja og broytta býarplaninum hevur lagt alt økið fram við hólmin og í mark til forna økið út til havn og ídnaðarøki. Økið hevur annars stórt hall og er rættuliga ónýtiligt til t.d. ídnaðarbygging.

Nýggi býarplanurin leggur næstan 2 kilometrar av havnarøki út og kann tað við stóra havnarlagnum á Tvøroyri sýnast í meira lagi, tá møguleikin fyri nýggjum havnarøki og bryggjukanti tá er nøktaður rættuliga nógv ár framyvir.

Friðingarnevndin fyri Suðuroyar Sýslu hevur viðmælt ætlaðu plasering av samferðsluhavnini og vísir í niðurstøðu síni einans til § 2, stk. 2 nr. 1 í fyrsta parti í løgtingslóg um náttúrufriðing frá 9. juli 1970, har sagt verður, at innangarðs eigur ikki at verða bygt, uttan loyvi frá friðingarnevndini, undir bakkanum frá vallingini og omaneftir og á øki, ið eru upp til 100 metur frá bakkatromini, har eingin fjøra er frá meginsjóðarmálanum.

Annar partur viðger náttúrufriðing, ið friðingarnevndin einki ger við í niðurstøðu síni. Sambært hesum parti § 6 stk. 1,2 og 3 kunnu friðingartiltøk setast í verk viðvíkjandi økjum á landi, á vøtnum – og firðum – og áum, tá friðingin má haldast ynskilig av vísindaligum ella søguligum orsøkum. Eisini viðvíkjandi økjum, ið bera av í vakurleika, hava sereyðkennir í landslagnum, plantugróður ella djóralívi, ið hava munandi týdning fyri fólk. Og afturat hesum fyri øki sum einsæris landsløg sum drangar, gjáir og gil, fossar, klettar, stórir steinar, áir, vøtn, trø og træhópar, - tá ið friðingin tykist ynskjandi í mun til vísindaligt ella søguligt virði, vakurleika ella sereyðkennir.

Føroya Náttúruverndarfelag hevur á aðalfundi 12. apríl viðgjørt plasering av samferðsluhavnini og vil harðliga mæla frá, at verkætlanin verður framd sum hon fyriliggur í løtuni. Sum er, verður neyðugt at spreingja og dýpa havnarlagið, tá alt ov grunt er í innara parti í ferguplássinum. Allarhelst er orsøkin til ætlaðu plasering at avmarka nøgdina av gróti, ið leggjast skal út. Hólmurin sýnist sum partur av uppfyllingini, men er lítið ella heldur einki vunnið í kostnaðinum, tá spreingjast skal út í botnlendinum.

Vit vilja tí mæla til, at náttúruøkið við Lítla Hólm verður friðað og lagt út í býarplaninum sum frílendi til tryggjan av framtíðar møguleikum at njóta órørda náttúru og annars at tryggja eitt neyðugt lívfrøðiligt margfaldni. Frástøðan til Drelnes og økisvíddin er ríkiliga stór til at samferðsluhavnin við fyrimunum kann flytast umleið 150 metur vestur so at rætta dýpið verður gagnnýtt og soleiðis at grótkastið heldur ger nýtslu av 10-12 metur grynnuni, ið liggur út fyri gomlu kirkjugarðsbrúnni. Tað sýnist ikki sum vegaíbindingin til landsveg er liðugt umhugsað. Hall er á landsvegastrekkinum og ein møgulig rundkoyring kann ikki fremjast uttan so at gamli kirkjugarðurin partvís verður tikin burtur.

Við hjáløgdu tekning verður heitt á Vinnumálaráðið og Tvøroyrar kommunu at bera so í bandi, at samferðsluhavnin verður flutt góðar 150 metur og Lítli Hólmur og økið kringum verður lagt út sum frílendi og náttúruøki burturav.

**Nevndin**
**Føroya Náttúruverndarfelag,**
**12. arpíl 2003**